# Hendur & Hugflog 2000

Søluframsýning fyri listhandverk og heimavirking

## Básyvirlit

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bás Nr. | Bás Navn | 13 | Margit og Herbjørg | 26 | Eydis og Jóannes | 39 | Gulklett |
| 1 | Torgerð Suðuroy | 14 | Magni Pauli Garðalíð | 27 | Føroya Banki | 40 | Lis og Malan |
| 2 | Elspa og Tina | 15 | Annika Heinadóttir | 28 | Poul Hans Justinussen | 41 | John Haraldsen |
| 3 | Tóra Tórgarð | 16 | Norðoyabásurin | 29 | Kotið | 42 | Linda Christophersen |
| 4 | Esmar Olsen | 17 | Lisa Hansen | 30 | Dirvi | 43 | Gunvá Justinussen |
| 5 | Ingibjørg Poulsen | 18 | Tóvar | 31 | Flóni | 44 | Handalag |
| 6 | Krista Poulsen | 19 | Eyðna og Jacobina | 32 | Jórun og Ann | 45 | Diana Jacobsen |
| 7 | Martin Tórgarð | 20 | Irena Hansen | 33 | Føroya Heima-virkisfelag | 46 | Jóna og Noomi |
| 8 | Finnur Olsen | 21 | Journeyman Leather | 34 | Gisleyg og Paula | 47 | Gestabúðin |
| 9 | Vevstovan v/ Poulinu Jensen | 22 | Shetland Jewellery | 35 | Sonja, Dora og Olga | 48 | Liss og Eydna |
| 10 | Pannukøku-húsið | 23 | Oda og Henny | 36 | Katrin og Cederfeldt | 49 | Elínborg Kjartansdóttir |
| 11 | Margretha og Anna Louise | 24 | Føroya Hand-arbeiðsskúli | 37 | Vevstovan Mýrifípan | 50 | Anna Gunnarsdóttir |
| 12 | Føroysk Trælist | 25 | Familjan Østerø | 38 | Maria Marsten | 51 | Sirri |

## Framsýningarskrá

Fríggjadagin 21. juli:

- kl. 15 Framsýningin letur upp
- kl. 16 Framsýningin verður sett
- kl. 18 Spælimanstónleikur
- kl. 20 Framsýningin letur aftur

Leygardagin 22. juli:

- kl. 14 Framsýningin letur upp
- kl. 15 Spælimanstónleikur
- kl. 16 Móta- og vørusýning
- kl. 17 Føroyskur dansur
- kl. 18 Móta- og vørusýning
- kl. 20 Framsýningin letur aftur

Sunnudagin 23. juli:

- kl. 14 Framsýningin letur upp
- kl. 15 Føroyskur dansur
- kl. 16 Móta- og vørusýning
- kl. 17 Harmonikatónleikur
- kl. 18 Móta- og vørusýning
- kl. 20 Framsýningin letur aftur

*Tað besta føroyska handaverki*

*Gestaframsýnarar úr Íslandi og Hetlandi*

*Ein livandi framsýning við fleiri sýningarbásum har fólk virka*

*Atgongumerki: Vaksin 25 kr. og børn í skúlaaldri: 10 kr.*






# Starv sum góðskuleiðari

Fyri framhaldandi at vera við í menningini av okkara framleiðslu og brynja okkum til stóru avbjóðingarnar, sum eru fyri framman, verður søkt eftir einum góðskuleiðara.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi og áhugavert starv sum góðskuleiðari fyri Havsbrún. Eitt starv við nógvum avbjóðingum í vinnugreinum, sum eru í støðugum vøkstri og broytingum. Eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú kemur at taka lut í og leggja tilrættis góðsku-stýringina og dokumentatiónina av framleiðsluni frá rávørum til lidnar vørur.

**Tað er ein fyritreyt, at tú:**
- Hevur góð samstarvsevni.
- Kanst arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.
- Ert tolin, men samstundis ágrýtin.
- Hevur ein ávísan teldukunnleika, dugir væl at samskifta, bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Útbúgving:**
Vit kundu hugsa okkum, at tú hevur eina holla útbúgving, sum gevur tær kunnleika til framleiðslu, kemi, biologi og mikrobiologi.

**Byrjunartíð**
1. september, men vit kunnu bíða nakað eftir rætta fólkinum.

**Løn:**
Sambært avtalu.

**Eitt sindur um Havsbrún:**
Havsbrún er eitt av størstu virkjunum í Føroyum og hevur 35 ár á baki. Á Havsbrún eru tríggjar deildir: Mjøldeildin framleiðir mjøl og lýsi burturúr fóðurfiski og slógvi. Fóðurdeildin framleiðir fiskafóður. Pelagos heilfrystir pelagiskan fisk. Havsbrún hevur ein umsetning uppá uml. 300 mill. kr, harav helvtin er útflutningur. Umleid 100 ársverk eru á virkinum.

Hevur tú hug, áræði, og sært teg føran fyri at røkja hetta starv, ert tú vælkomin at søkja.
Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu vera Havsbrún í hendi í seinasta lagi 24. juli.

Nærri upplysningar um starvið kunnu fáast við at ringja til Havsbrún, og spyrja eftir Jústines ella Pól.

HAVSBRÚN

pf Havsbrún
Box 81
FO-530 Fuglafjørdur
Tlf.: 44 41 60
Fax 44 44 00
Email:bep@havsbrun.fo

Sosialurin - 311820

**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

## Starvsfólk til matstovuna

Søkt verður eftir einum fólki at reka matstovuna í Fíggjarmálastýrinum, ið heldur til á Argjum. Tað eru 5 stovnar/deildir í hølunum hjá Fíggjarmálastýrinum og eru umleið 100 starvsfólk.

**Arbeiðsuppgávur:**
Starvið umfatar: Gera mat til starvsfólkið, ið nýta matstovuna. Standa fyri innkeypi av mati, gerð av kaffi/te til fundir o.t.. Starvið umfatar eisini reingerð av matstovuni.

Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður at seta skjótast gjørligt.

**Útbúgving:**
Ynskiligt er, at viðkomandi ið settur verður, hevur drúgvar royndir innan køks- ella kantinuarbeiði.

**Løn:**
Starvið verður lønt sambært galdandi sáttmála við viðkomandi yrkisfelag.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn verður at senda innan 14. august 2000.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Stýrið
Postboks 2151
FO-165 Argir

**Meira fæst at vita**
við at seta teg í samband við Birgit Hansen, deildarstjóra á tlf. 35 20 26.

*Allar støddir*
- **Rundsagabløð**
- **Diamantskivur**
- **Skeriskivur**

*Vit hvessa eisini*



**Tórshavnar Maskinhandil**
v/Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30
100 Tórshavn • Tel. 313442

**Bahá'í samfelagið í Tórshavn**
**Miðstøðin í Gundadali**

Opið hvørt fríggjakvøld.
Samkoma kl. 20

»Bønarsinnisstøðan er av bestu sinnisstøðum, tí menniskjað er tá í sameining við Guð«
Bahá'i skriftir
www.bci.org/bahai.fo

## Tilboð frá Súkkluhandlinum í Kollafirði

### Easy Boarding súkkla

lyft beinið 15 cm. og tygum eru komin uppá.



26" alufelgur, 3 gear, fót + hondbremsu, fasta kurv, bagasjuberara, ljós, frakkaverja, standari.

Prísur: 3.675,- kr.

Eisini aðrar kvalitetssúkklur í øllum støddum.

**Tlf. 421511**

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

# YVIRLÝSING

Undirritaðu feløg skulu við hesum boða frá, at í 1999 kom í gildi sáttmáli fyri m.a. gistingarhús og matstovur, og nú eru so at siga øll øki á privata arbeiðsmarknaðinum fevnd av sáttmála.

Fakfeløgini hava síðani fleiri ferðir roynt at fingið gistingarhús og matstovur at fylgja galdandi sáttmála, men bert fá gistingarhús og matstovur hava latið við seg koma.

Av teimum størru gistingarhúsunum og matstovunum, sum enn ikki vilja fylgja galdandi sáttmála, kunnu vit nevna:

| | | |
|---|---|---|
| **Hotel Hafnia** | **Hotel Føroyar** | **Sjómansheimið í Tórshavn** |
| **Rio Bravo** | **Cafe Natúr** | **Marco Polo** |
| **Nan-Tong** | **Pizza 67** | **Sjómansheimið í Runavík** |

Hesir arbeiðsgevarar tykjast ikki vilja virða vanliga rættin hjá starvsfólki at arbeiða eftir skipaðum arbeiðs- og lønarviðurskiftum, og vit fara tí við hesum at heita á stovnar, feløg og limir í fakfeløgum at hava hetta í huga, tá tiltøk av ymsum slag verða fyriskipað og soleiðis vísa stuðul sín til krav okkara um at hesir arbeiðsgevarar fylgja galdandi sáttmála.

Bert við at standa saman kunnu vit vinna løntakarunum sømulig arbeiðs- og lønarviðurskifti, og vit hava tí avgjørt, at vit nú fara undir at samskipa tiltøk, sum skulu tryggja limum okkara sjálvsagda rættin at fáa tær sømdir, sum ásettar eru í galdandi sáttmála.

**FØROYA ARBEIÐARAFELAG** **HAVNAR ARBEIÐSKVINNUFELAG**